# Útisetar – týdning fyri fólkaræðið

**– Føroyska fólkaræðið hevur altíð notið gott av, at føroyingar, ið búleikast uttanlands, siga sína hjartans meining um evni, ið eru frammi í føroyska kjakinum, segði Herálvur Joensen, føroyskur sendimaður í Keypmannahavn, tá hann setti ólavsøkuna á Bryggjuni**

ÓLAVSØKA Á BRYGGJUNI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í setanarrøðuni tók Herálvur Joensen støði í felags upplivingini, sum ólavsøkan er fyri allar føroyingar. Helst er tað júst tí, ólavsøkan er okkara tjóðarhátíð, helt herálvur fram. Onkursvegna er ólavsøkan ein ímynd og samanrenning av okkara verðsliga, politiska og andaliga samleika, har øll kenna seg aftur í onkrum, sum hon umboðar.

### Kjakið brúk fyri útisetum

Men felags upplivingin røkkur longur enn til ólavsøkuna. Herálvur vísti á, at Føroyar eru fáment tjóð, og tí er ikki nóg mikið, at føroyingar í Føroyum eiga samfelagsliga orðaskiftið einsamallir. Sum dømi nevndi hann kjakið um Visjón 2015, har vit neyvan kunnu vera ósamd um, at tað er gott, at landsstýrið setur sær mál, ið røkka longur enn til dagsins evni.

– Skal ætlanin tó eydnast til fulnar, er umráðandi, at allir føroyingar, eisini teir, ið búleikast uttanlands, taka lut í orðaskiftinum um, hvørji mál Føroyar eiga at seta sær, segði Herálvur og minti á, at nógv samfelags- og mentanarlig hugskot hava sæð dagsins ljós millum føroyingar í útlegd, áðrenn tey rúma tíð seinni eru rótfest í orðaskiftinum – og kanska sett í verk heima.

– Tað sigst, at føroyingar kunnu vera heldur erkvisnir, og útisetar, sum loyva sær at siga sína hugsan, kunnu rokna við onkrum glepsinum fyri teirra støðu sum útisetar, tá teir leggja seg út í kjakið. Serliga um teir siga onkran sannleikan, segði Herálvur, men minti á, at summi evni høvdu helst verið tagd burtur, um ikki onkur framfýsin útiseti hevði tikið tey upp.

Herálvur ivaðist tó ikki í, at stóra talið av føroyingum, sum búleikast og nema sær útbúgving í Danmark, gevur góðar møguleikar fyri, at tað eisini í komandi árum fara at koma spennandi tankar og hugskot frá føroyskum útisetum á hesum leiðum.



*- Helst høvdu summi evni verið tagd burtur heima í Føroyum, um ikki onkur framfýsin útiseti hevði tikið tey upp, segði Herálvur Joensen, føroyskur sendimaður, í setanarrøðuni á Bryggjuni*

# Føroyskur dansur í 30 hitastigum

**Í 30 hitastigum, sandalum, stuttum buksum og sóltoppum trein ein litfagur skari dansin seinnapartin ólavsøkuaftan á Bryggjuni í Keypmannahavn**

ÓLAVSØKA Á BRYGGJUNI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Sveinur Sørensen, ið hevur búð niðri í meir enn 50 ár, tryggjaði, at føroyski dansurin á Bryggjuni gekk fyrimyndarliga væl.*

Kroppar gerast sum kunnugt ofta heitir í føroyskum dansi – ovurheitir meir at kalla í dansinum á Bryggjuni í Keypmannahavn á ólavsøku. Men hóast 30 hitastig og ikki eitt lot var í luftini, vóru ólavsøkugestirnir skjótir at nýta at sláa ring, og dansað varð bæði væl og leingi.

### Og dansurin gekk ...

Hóast hann er farin um tey 80, stóð tað ikki á hjá Sveini Sørensen at skipa fleiri kvæði á tamb.

Tað var ikki minst honum fyri at takka, at dansurin gekk so fyrimyndarliga væl, hóast øll ikki vóru royndir dansarar, og onkur kanska als ikki hevði roynt tað fyrr.

Sum alt annað á ólavsøkuhaldinum á Bryggjuni, var føroyski dansurin sera væl fyriskipaður. Eitt nú høvdu fyrireikararnir syrgt fyri, at eitt serligt gólv varð lagt á brúgvarsteinarnar, har dansað varð, ið fjaðraði og gav eftir á hóskandi hátt.

Føroyski dansurin ólavsøkuaftan var partur av almennu skránni ólavsøkudagarnar á Bryggjuni. Hetta forðaði tó ikki ólavsøkugestunum í at halda á, og út á kvøldið og ólavsøkudag hendi tað seg meir enn so, at ein spontanur dansiringur tók skap, og trivið varð í eitt kvæði ella bæði tvey.



*30 hitastig forðaðu ikki ólavsøkugestunum á Bryggjuni at trína dansin og kvøða fleiri kvæði á tamb*



*Bæði børn og vaksin hugnaðu sær óført á ólavsøkuhaldinum á Bryggjuni.*

# Ein minniríkur dagur

**- Eg hevði sett mær fyri, at eg fyrr ella seinni skuldi uppliva eina ólavsøku í Keypmannahavn. Men at hetta skuldi gerast so stórsligið og minniríkt, hevði eg nú ikki væntað, helt Jórun Høgnesen, býráðslimur í Klaksvík, fyri, tá við fingu orðið á hana á Bryggjuni**

ÓLAVSØKA Á BRYGGJUNI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Jórun Høgnesen, býráðslimur og róðrarkvinna úr Klaksvík, helt tað vera nakað heilt serligt at sleppa at uppliva ólavsøkuna á Bryggjuni í Keypmannahavn*

Nøgv kend andlit vóru at síggja á ólavsøkuhaldinum á Bryggjuni í Keypmannahavn. Millum onnur hittu vit býráðslimin og ídnu róðrarkvinnuna, Jórun Høgnesen, úr Klaksvík.

### Heilt serlig sjarma

10 mannaróðurin í Havn var júst liðugur, tá vit hittu Jórun, og tað var eisini gott tað sama, tí annars hevði neyvan borið til at fingið orðið á hana. Framvegis nakað pøst av at rópa við lív og sál á "Klaksvíkingin" helt Jórun fyri, at hetta sanniliga gjørdist ein minniríkur dagur.

– Eg havi altíð ynskt at sleppa at uppliva eina ólavsøku í Keypmannahavn. At tað so gjørdist dagurin, har "Klaksvíkingur" vann hendan ótrúliga spennandi 10 mannaróðurin er jú heilt fantastiskt. Eg sá tað ljóslivandi fyri mær, segði ovurfegna róðrarkvinnan.

Jórun helt annars summarfrí á Bornholm, men hevði sett hendan dagin av til ólavsøkuhaldið á Bryggjuni. Hon var rættiliga tikin av fótum av framúr góðu og stórslignu umstøðunum, og ikki minst av, hvussu væl fyriskipað alt tiltakið var. Serliga at tað allatíðina hendi okkurt forvitnisligt, men tú allíkavæl hevði tíð til at práta við fólk.

– Eg elski at hitta føroyingar, tá eg eri uttanlands. Tað hevur sína heilt serligu sjarmu, tí ofta er tað jú fólk, tú ikki hevur sæð í mong harrans ár, segði Jórun, sum helt stigtakararnar eiga stóra tøkk uppbornað.

- Tey hava skapað nakað her á Bryggjuni, sum veruliga er vert at savnast um. Góðar røður, tiltøk, tónleikur og ikki at gloyma vøkru sjónina, at síggja flaggskrýddar føroyskar bátar sigla aftur og fram her í Kanalini – eg njóti hvørja løtu. Tað má eg siga, hetta hevur í meir enn ríkiligt mát livað upp til allar mínar væntanir, smíltist Jórun.